UTTAN ÚR HEIMI



Tað er ikki greitt, hvussu mong hava latið lív í borgarakrígnum á Haiti

# Vænta blóðbað á Haiti

**Sivilfólkið á Haiti stúrir fyri, at alt endar í einum blóðbaði, nú bæði stjórnarherurin og uppreistrarmenninir hava havnað øllum semingsroyndum**

HAITI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Politiska andstøðan á Haiti sýtti fyri at góðtaka friðarætlanina, sum USA, ES og onnur lond høvdu lagt fram. Sambært henni skuldi tann umstríddi forsetin, Jean Bertrand Aristide, varðveita ein part av sínum valdi, og tað góðtekur andstøðan ikki. Hann skal heilt einfalt burtur frá øllum valdi, er kravið hjá andstøðuni og uppreistrarmonnum hennara.

Meðan diplomatar royndu at fáa semju ímillum partarnar, tóku uppreistrarmenninir seg fram. Fyrradagin tóku teir býin Port-de-Paix, og síðani sunnudagin hava teir havt valdið í landsins næststørsta býi Cap Haitien.

Guy Philippe, uppreistrarleiðari, hevur lovað, at menn hansara fara eisini at taka høvuðsstaðin Port-au-Prince. Í gjár fyrireikaðu fólk har seg til, at býurin verður álopin, og sivilfólkið í býnum óttast eitt rættiligt blóðbað, tá bardagarnir um býin bresta á.

Tað er ógreitt, hvussu mong fólk hava latið lív, síðani uppreisturin á Haiti byrjaði tann 5. februar.

# Morð var kanska hevnd fyri vanlukku

**Tað var kanska hevnd fyri eina flogvanlukku, tá ein danskur flúgvileiðari í Sveits varð myrdur uttan fyri hús síni týsdagin.**

HEVND
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tann 36 ára gamli danski flúgvileiðarin var einsamallur á vakt í flogeftirlitinum, tá eitt russiskt ferðamannaflogfar og eitt týskt flutningsflogfar stoyttu saman í luftini uppi yvir Boden-vatninum í Suðurtýsklandi fyri tveimum árum síðani. Vanlukkan kravdi 71 mannalív.

Fyrrakvødið varð flúgvileiðarin stungin niður uttan fyri hús síni í Zúrich, sigur sveitsiska løgreglan, sum nú kannar, um morðið kanska var hevnd fyri vanlukkuna. Løgreglan veit ikki, hvør drápsmaðurin er, men kona flúgvileiðaran hevur greitt frá, at tað var ein maður um 50 ára aldur, sum drap mann hennara. Maðurin tosaði týskt.

Aftan á vanlukkuna fyri tveimum árum síðani kom kanningarnevndin við hvøssum atfinningum at felagnum Skyguide, sum hevur ábygrdina av flúgvieftirlitinum á vanlukkuleiðini. Sagt varð millum annað, at danski flúgvileiðarin varnaðist alt ov seint, at tey bæði flogførini fóru at stoyta saman í 13.000 metra hædd. 44 sekund eftir, at hann hevði varnast, hvat kundi henda, stoyttu flogførini saman.

# BUSH OG TEY SAMKYNDU

**George W. Bush, forseti, hevur drigið hjúnarlag ímillum samkynd upp í valstríðið. Málið er at fáa fatur á teimum veljarunum, sum seta siðalæru og kristindóm í hásætið, men hetta kann eisini vera vandamikið**

VALSTRÍÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Eygleiðarar høvdu væntað, at Bush fór at taka búskaparmál ella kríggið í Irak fram, nú hann av álvara er farin undir valstríðið upp undir forsetavalið í heyst, men hann valdi eitt heilt annað evni.

Týsdagin kunngjørdi Bush, at hann fer at virka fyri, at hjúnarlag ímillum samkynd verður mett sum brot á amerikonsku grundlógina. At hann metir málið álvarssamt sást á orðalagnum, sum minti um álvaran aftan á atsóknirnar tann 11. september í 2001.

Tað fall mongum fyri bróstið, at forsetin helt hjúnarlag ímillum samkynd vera tað týdningarmesta at draga fram. Í fyrra lagi USA stendu framman fyri nógvum hóttanum, sum eru munandi størri ann tað samkynda hjúnarlagið, og harafturat er nógv, sum forsetin kann rósa sær av. Í øðrum lagi er hjúnarlag ímillum samkynd ikki eitt veruligt evni til valstríðið. 38 amerikanskir statir hava longu boðað frá, at teir viðurkenna ikki samkynd hjúnarløg, og í 1966 samdust Clinton-stjórnin og Kongressin um eina lóg, sum sigur, at stjórnin viðurkennir heldur ikki hjúnarlag ímillum samkynd, og at tað stendur teimum einstøku statunum frítt, hvørja støðu teir taka.

## Ørkymlaðir veljarar

Men hví tekur Bush so hetta evnið fram? Jú, tí hann veit, at í einum valstríði er umráðandi at finna eitt støði og at virka út frá tí, og tað er júst tað, hann nú ger. Grundstøðið í tí republikanska flokkinum eru tey, sum seta siðalæru og kristnu læruna í hásætið. Í fleiri statum sita hesi við valdinum, og kann forsetin ikki fáa tey at arbeiða fyri seg, kann hann ikki vinna valið í heyst.

Kanningar aftan á valið fyri fýra árum síðani avdúkaðu, at tá vóru seks milliónir færri av hesum veljarunum á vali enn á kongressvalinum í 1996, og í seinastuni hava fleiri teirra sagt seg vera misnøgd við forsetaskeiðið hjá Bush. Eitt nú fýlast tey á, at kenslumálaráðið hevur ov stóra ávirkan á skúlaverkið og frálæruna har, og tey halda eisini, at stjórnin nýtir ov nógvar pengar til list. Felagsskapurin Christian Coalition vil vera við, at bæði kenslumálaráðið og tann almenni listargrunnurin hava eina samkynda dagsskrá, og í síðstu viku skrivaði blaðið Washington Times, at tann átrúnaðarligi høgravongurin av ørkymlaður av Bush.

Tí leggur forsetin nú eftir teimum samkyndu fyri at vinna álitið millum tey víðgongdu átrúnaðarligu aftur. Hesi hava neyvan frøtt seg framman fyri sjónvarpsskugganum í seinastuni, har glaðir menn hava kyst hvør annan uttan fyri ráðhúsið í San Fransisco. Meiningakanningar vísa eisini, at flestu amerikanararar hava somu áskoðan sum forsetin, tí 59 prosent siga seg vera ímóti samkyndum hjúnarløgum. 34 prosent eru fyri.

## Ikki bara vinningur

Men tað er ikki vist, at tað er ein fyrimunur fyri forsetan at taka tað samkynda hjúnarlagið upp í valstríðið. Tí minst fýra trupulleikar eru við hesum.

Í fyrsta lagi kunnu fólk fáa ta uppfatan, at forsetin er í neyð, og at hann tí hevur tikið evnið upp. Hetta kann verða tulkað, sum at hann roynir at skáka sær undan øðrum evnum so sum hansara egnu hermannatíð, krígnum í Irak, tí ovurstóra hallinum á fíggjarlógini og sínum egna trúvirði.

Í øðrum lagi er forsetin farin niður av leiðarapallinum. Undan valstríðnum ætlaði hann at nýta forsetaembætið sum støðið og at vísa seg sum statsmannin, ið ikki legði í smámál ella tað, ið verri er. Men nú er hann ikki longur statsmaðurin, men eitt vanligt valevni í valstríðnum.

Í triðja lagi vilja amerikonsku veljararnir fegnir hava eitt valevni, sum er bjartskygt, og sum umfatar alt, og yvirhøvur hava amerikonsku veljararnir lítlan samhuga fyri teimum ytstu á tí átrúnaðarliga vonginum. Við sínum seinasta útspæli hevur forsetin gjørt, at nógvir veljarar fara at uppfata hann sum ein, ið skilir heldur enn savnar, og taðer ikki tað, veljararnir vilja hava.

Í fjórða lagi hevur hann við orðum sínum um tey samkyndu fingið øði í andstøðuna, tí er tað nakað, sum demokratunum ikki hóvar, so eru tað royndir at gera amerikanskar minnilutar til syndabukkar.






Skrivstovufólk til skuldarabókhald

Til eitt virki í Tórshavn verður søkt eftir einum fólki til skuldarabókhaldið. Arbeiðið snýr seg fyrst og fremst um at røkja sambandið við skuldararnar, at gera gjaldsavtalur við teir og hava eftirlit við, at tær verða hildnar.

Talan er ikki um fulltíðarstarv, og tann, sum settur verður í starvið, kann sjálvur vera við til at leggja arbeiðstíðina til rættis.

Løn sambært avtalu.

Starvið skal setast so skjótt sum til ber. Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 1. mars 2004.

Sosialurin 341800

RASMUSSEN & WEIHE
STATSAUTORISERAÐ GRANNSKOÐARAFELAG P/F
PRICEWATERHOUSECOOPERS
An associated firm of
Á Glaðsheyggi · Box 30 · FO-110 Tórshavn
Tel. (+298) 35 17 00 · Fax (+298) 35 17 01
E-mail: rasmussen@rasmussen.fo
http://www.rasmussen.fo



Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar

Aðalfundur

Aðalfundurin hjá Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar verður á Hotel Føroyum leygardagin 27. mars 2004 kl. 10.00

Dagsskrá:
1. Val av fundarstjóra
2. Val av atkvøðuteljarum
3. Góðkenning av dagskrá
4. Góðkenning av starvsskipan
5. Frágreiðing formansins
6. Framløga av rammufíggjarætlan og roknskapi, harímillum áseting av limagjaldi
7. Innkomin uppskot
8. Val av tveimum grannskoðarum
9. Ymiskt

**Uppskot, sum skulu vera viðgjørd á aðalfundinum, mugu vera felagnum í hendi 1. mars 2004**

Ein drekkamunnur fæst millum kl. 9.30 - 10.00

**Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar**



Salong Una

Eg eri flutt yvir til Malan Dávidsen í Vágstúni at arbeiða.

**Tlf. 455438**



TILBOÐS DAGAR

EPSON printarar, printarapappír og patrónir



÷30%

Framkalling av digitalum myndum
Send tínar digitalu myndir til:
myndir@3-arin.com

3arin

FOTODEILDIN · SMS · Tel 35 35 32 · Fax 35 35 36 · www.3-arin.com



Aðalfundur

í Føroya Arbeiðarafelag

Fráboðaði aðalfundur Føroya Arbeiðarafelags verður

**fríggjadagin og leygardagin 19.-20. mars**

í hølum felagsins, Tjarnardeild 7, 100 Tórshavn, **byrjað verður báðar dagar kl. 10.00.**

Uppskot til fundin skulu vera skrivstovu felagsins skrivliga í hendi **í seinasta lagi mánadagin 1. mars 2004.**

Seinasta freist fyri tilmelding til aðalfund og innivist er 1. mars 2004.

**Føroya Arbeiðarafelag**



Stjóri til P/F Fiskaaling

**Søkt verður eftir stjóra til P/F Fiskaaling.**
Hevur tú hug til avbjóðingar og vilt verða við til at leggja lunnar undir at menna føroysku alivinnuna, so ert tú møguliga komandi stjórin á P/F Fiskaaling.

Viðkomandi, ið settur verður, hevur ábyrgdina av, at felagið við atliti til endamálið verður rikið undir handilsligum treytum.

**Høvuðsuppgávurnar hjá P/F Fiskaaling eru:**
- At gera vísindaligar royndir við aling av fiski, skeljadýrum v.m. herímillum skapa møguleikar fyri aling av nýggjum fiska- og skeljasløgum
- At gera royndir við nýggjum aliøkjum
- Við kynbótaarbeiði at bøta um alitilfar og við sølu av framleiðslum burtur úr hesum spjaða framgongdina skjótast gjørligt til vinnuna
- At reka vinnuligt virksemi innan virksemisøki felagsins

P/F Fiskaaling rekur vinnuligt virksemi innan kynbótaarbeiði við laksum og sílum, og framleiðir felagið laksa- og sílarogn.

**Ynskiligt er, at umsøkjarin hevur fylgjandi førleika:**
- útbúgving frá hægri lærustovni
- góð leiðslu- og samstarvsevni
- royndir at standa fyri vinnuligum virksemi
- evni at seta fyriskipanir í verk
- kunnleika til fíggjarstýring
- kunnleika til alivinnuna og til lívfrøði er ein fyrimunur.

**Setanartreytir**
Arbeiðsstaðið er á høvuðsskrivstovuni hjá P/F Fiskaaling Við Áir. Starvið verður sett skjótast gjørligt, men vit hava møguleika at bíða nakað eftir rætta viðkomandi. Lønin verður ásett eftir nærri avtalu, í mun til útbúgving og starvsroyndir.

Vilja tygum hava nærri upplýsingar um starvið, kunnu tygum seta tygum í samband við Janet Fríðu Johannesen, nevndarformannn tlf. 212211 ella við telduposti: jj@atlanticon.fo.

**Umsókn**
Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum ummælum, skulu sendast til Janet Fríðu Johannesen, co/Atlanticon, Bryggjubakki 4, Postboks 263, FO-110 Tórshavn, í seinasta lagi 1. mars 2004. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

*P/F Fiskaaling er partafelag, har Føroya Landsstýri eigur allan partapeningin. P/F Fiskaaling hevur virksemi Við Áir, í Nesvík, í Skopun og í Hesti. Samlaða starvsfólkatalið er 23. P/F Fiskaaling er merkt av kreppuni í alivinnuni. P/F Fiskaaling stendur fyri kynbótaarbeiði við laksi og sílum. Endamálið við kynbótaarbeiðnum er at ala fram ein frískan fisk, sum hevur best møguligar eginleikar, soleiðis at føroyska alivinnan er betur kappingarfør á altjóða marknaðinum. Arbeitt verður við at effektivisera kynbótaarbeiðið. Arbeitt verður eisini við at menna kalva og onnur nýggj fiskasløg til føroysku alivinnuna. Arbeitt verður við at menna granskingina, sum náttúrliga hoyra undir virkisøki felagsins. Meiri fæst at vita um felagið á www.fiskaaling.fo*

P/f Fiskaaling



veitst tú ikki tað?
Sosialurin